# Ein tann friðarligasta Eystanstevnan nakrantíð

Nógv fólk hevur verið á Eystanstevnu, men stevnan hevur sambært løgregluni í Runavík verið sera friðarlig. Frá fríggjakvøldinum til sunnumorgunin klokkan hálvgum fýra, lat næstan ikki í telefonini á løgreglustøðini.

Sunnumorgunin komu boð um, at menn vóru farnir til hendurs uttan fyri ítóttarhøllina í Runavík, einki politimál stóðst tó av hesum, og menn fóru hvør til sítt, tá løgreglan kom á staðið.

Løtu seinni komu boð um, at tveir mans vóru í ferð við at bróta inn umborð á Høganesi. Løgreglan kom á staðið og tók mennirnar, sum umframt innbrot høvdu gjørt eitt sindur av herverki. Teir vóru so ávirkaðir av rúsdrekka, at tað var ikki hugsingur um at avhoyra teir. Teir vórðu tí koyrdir til Havnar at sova rúsin av sær, áðrenn teir sunnudagin vórðu avhoyrdir.

Løgreglan í Eysturoynni hevur gjørt nakrar ferðslukanningar, men eingin er tikin fyri rúsdrekkakoyring. Vakthavandi í løgreglustøðini sigur, at góða náttarbusssambandi ger góðan mun. Hann sigur, at hendan Eystanstevnan er ein tann friðarligasta nakrantíð.

**nud**

# Friðarligt í stóru býunum

Bæði í Havn og í Klaksvík boðar løgreglan frá einum friðarligum vikuskifti. Okkurt smávegis var tó Um fýra tíðina leygarnáttina vóru nakrir mans farnir til hendurs, men tá løgreglan kom á staðið sissaðust menn. Tað var torført at fáa greiðu á, hvør hevði skuldina, og ongin ynskti at melda tilburðin

Sunnunáttina var ein bardagi í klubbagarðinum í Havn, beint eftir at dansistøðini lótu aftur. Men tá Løgreglan kom á staðið, sissaðust menn og fóru hvør til sítt.

**nud**

# Maður grulvaði til hús

Løgreglan í Havn mundi leygarmorgunin tikið ein mann upp. Beint eftir klokkan sjey ringdu fólk og boðaðu frá, at ein avdottin maður lá við Snikkaravirkið í Grønlandi. Áðrenn løgreglan var komin í bilin, ringdi fólk og segði, at ein maður lá avdottin við Rekkjuhúsini úti við Vesturkirkjuna, Júst komin í bilin, ringdi aftur, og ein segði, at ein maður lá avdottin í Kinabrekkuni. Tá løgreglan kom á staðið var maðurin ongastaðni at síggja, og niðurstøðan má verða, at hann hevur grulvað heim ella afturum onkrastaðni at sova, uttan at verða órógvaður.

**nud**

# Ibuprofen verður etið sum bomm

**HEILSA**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Ibuprofen verður etið sum bomm, sigur forkvinnan í Giktafelag Føroya Anna Petersen, við Sosialin, eftir at tíðarritið British Medical Journal hevur almannakunngjørt kanning, sum vísir at pínutablettirnar Ibuprofen, Brufen, Ipren og Diclofenac, økja vandan fyri blóðproppi í hjartanum og øðrum hjartasjúkum. Tað er danska morgunblaðið Politiken, sum endurgevur kanningina.

Kanningin, sum er almannakunngjørd í British Medical Journal, umfatar 9.218 sjúklingar, sum hava fingið hjartatilbur. Kanningin vísir, at Diclofenac, sum verður selt undir nøvnunum Diclon og Voltaren økir um vandan fyri hjartatrupulleikum við 55%, meðan Ibuprofen, sum m.a. eisini verður selt undir nøvnunum Brufen og Ipren, økir vandan fyri hjartatrupulleikum við 22%.

Hesar pínutablettirnar verða nýttar fyri alt frá tannapínu til kroniska gikt. Í Føroyum eru sera nógv fólk, sum líða av gikt. Anna Petersen sigur, at Ibuprofen er ein partur av gerandisdegnum hjá giktasjúkum, pínan er ov svár til ikki at takað heilivágin. Enn er heldur ikki komin annar heilivágur, sum er haldgóður avloysari til Ibuprofen. Giktsjúk eru í eini støðu, har tað er, sum at velja millum pest og kolera, sigur Anna Petersen við Sosialin.

Biologiskur heilivágur er komin á marknaðin, sum er rættuliga góður, men virkar ikki hjá øllum, harafturat er hesin heilivágur sambært forkvinnuni í Giktafelag Føroya, so øðiliga dýrur. Nýggjur heilivágur er altíð dýrur fyrstu tíðina, men Anna Petersen sigur, at hon vónar, at hetta fer at broyta seg. Serliga nú kanningin vísir so skaðilig árin av Ibuprofen, vónar hon, at heilivágsídnaðurin fer at leggja dent á at skapa veruligan og ódýran avloysara fyri Ibuprofen.

Giktafelag Førioya hevur 500 limir, og arbeiðir við at kunna giktasjúk, um hvussu tey læra at liva við giktini. Her er rørsla sera týdningarmikil. Fólk verða lærd at meistra tað at hava gikt. Røtt kroppslig venjing hevur við sær at vøddarnir styrkjast og hetta hjálpir uppá giktina, harumframt hækkar venjingin pínugáttina.

Anna Petersen sigur seg harmast um, at vit ikki hava nakran serlækna í liða og giktasjúkum, ein sonevndan Rheumatolog, men at næstu ferð danskir Rheumatologar koma til Føroyar, ætlar hon at heita á teir, um at halda ein kunnandi fund um trupulleikarnar við Ibuprofen.

Forkvinnan er tó bjartskygd, hon sigur at Giktafelagið, umboð fyri sjúkrahúsini, kommunulæknarnar og fyri Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiða við at gera eitt álit, um giktasjúku og giktaviðgerð í Føroyum.




TOYOTA COROLLA 1,4
TERRA STW.
6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** SF 869 **KM:** 55.000
**Árgangur:** 18.10.01 **Seinast sýnaður:** 08.02.05
**Viðmerking:** El-rútar / spegl - Radio/CD - Sentrallás

**Kr. 119.000,-**



TOYOTA COROLLA 1,6
SEDAN
6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TA 080 **KM:** 23.000
**Árgangur:** 26.05.04 **Seinast sýnaður:** 26.05.04
**Viðmerking:** El-rútar / spegl - Radio/CD - Fjarstýrt sentrallás - Aircondition

**Kr. 180.000,-**



TOYOTA CARINA E 2,0 GLI
AUT.

**Skrásetingarnr.:** F 50969 **KM:** 127.000
**Árgangur:** 01.08.94 **Seinast sýnaður:** 20.01.04
**Viðmerking:** Sentrallás - Radio/CD - El rútar/spegl

**Kr. 56.000,-**



TOYOTA AVENSIS 1,8
TERRA
6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** DM 970 **KM:** 90.000
**Árgangur:** 29.12.99 **Seinast sýnaður:** 02.05.05
**Viðmerking:** El-rútar / spegl - Radio/CD - Fjarstýrt sentrallás

**Kr. 118.000,-**



TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA

**Skrásetingarnr.:** GD 102 **KM:** 76.000
**Árgangur:** 04.05.99 **Seinast sýnaður:** 18.05.04

**Kr. 72.000,-**



HYUNDAI ATOS 1,0

**Skrásetingarnr.:** UV 274 **KM:** 48.500
**Árgangur:** 25.10.00 **Seinast sýnaður:** 26.01.04
**Viðmerking:** Sentrallás - Elrútar - Radio/bandspælari - Powerstýring

**Kr. 48.000,-**



TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA
AUT.
6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** BR 947 **KM:** 55.000
**Árgangur:** 30.06.00 **Seinast sýnaður:** 03.03.04
**Viðmerking:** Sentrallás - Radio/CD - Elrútar/spegl

**Kr. 92.000,-**



DAEWOO NUBIRA 2,0 STW.
6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** FB 737 **KM:** 57.000
**Árgangur:** 14.05.02 **Seinast sýnaður:** 14.05.02
**Viðmerking:** Elrútar A/F - Klima - Leðursetur - Radio/CD - Sentrallás

**Kr. 110.000,-**



TOYOTA COROLLA 1,6
HATCHBACK
6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** PJ 621 **KM:** 20.000
**Árgangur:** 23.06.03 **Seinast sýnaður:** 23.06.03
**Viðmerking:** El-rútar / spegl - Radio/CD - Fjarstýrt sentrallás

**Kr. 158.000,-**



BMW 323 E 36 2,5
6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** NG 518 **KM:** 135.000
**Árgangur:** 02.08.96 **Seinast sýnaður:** 06.07.04
**Viðmerking:** Elrútar A/F - Klima - Leðursetur - Radio/CD - Sentrallás

**Kr. 128.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F